*» Enn veit eg ikki, hvar eg spæli næsta. Eg leiti framvegis eftir einum nýggjum felag, og kanska er ein loysn ávegis innan næstu 48 tímanar«*

*Patrick Vieira, Juventus*

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801



# Vilja ikki tapa

**Í B36 hava tey ikki tapt heimadyst í Europa-Cup í tvey ár, og tað hava spælararnir ongar ætlanirnar um at broyta í kvøld**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Í Istanbul var trýstið á b36 øgiligt. Liðskiparin vónar ikki, at trýstið verður eins stórt hesaferð, og í øllum førum ætla hann og liðfelagarnir sær, at talan verður um gott úrslit í kvøld*

Klokkan 18.30 verður dysturin millum B36 og Fenerbache bríkslaður ígongd á Tórsvølli í Havn.

Talan er um seinna dystin millum liðini, og eftir 4-0 heimasigur í fyrru uppgerðini, er neyvan nakar hugsingur um, at B36 fer at vinna seg víðari í kappingini.

– Vit mugu nokk vera eitt sindur realistiskir, so tann møguleikan hugsa vit ikki so øgiliga nógv um, sigur liðformaðurin hjá B36, Klæmint Matras.

Men hann leggur tó dent á, at B36 ikki hevur skarvin yvir á tann hátt, at teir longu hava givið dystin í kvøld upp.

– Vit fara so at gera okkara fyri at røkka best møguliga úrslitinum. Vit hava ikki tapt Europa-Cup uppgerð á Tórsvølli í tvey ár, og tey hagtølini vilja vit halda fast um.

– Sjálvandi hava teir eitt øgiliga sterkt lið, men vónandi taka teir eitt sindur lættari upp á uppgávuna hesaferð, nú teir longu eru mest sum vísir í víðari luttøku. Tað hevur eisini verið tosað um, at teir kanska fara at nýta fleiri av eykamonnunum, men tað nýtist so ikki at vera nakar fyrimunur hjá okkum. Ofta vilja slíkir menn prógva fyri venjaranum, at teir eiga at byrja inni næstu ferð, og so kann tað væl gerast heilt trupult, heldur Klæmint.

## Mugu tora

Um uppskriftina hjá B36 til dystin, sigur hann, at tað fyrst og fremst ræður um at tora at spæla fótbólt.

– Tað nyttar einki, um vit allan dystin eru í verjustøðu. Tá verður talan aloftast um sparkarí. Og megna vit ikki at halda bóltin í egnari røð, er skjótt, at trýstið verður heilt stórt. Og tí vilja vit helst sleppa undan.

Í mun til dystin í Istanbul, so er longu víst, at nakrar broytingar verða gjørdar á B36-liðnum. Mikkjal Thomassen er tøkur aftur eftir leikbann, og tað er heilt víst, at hann verður á sentrala miðvøllinum. Her var Niels Joensen vikarur á miðvøllinum, og hann verður helst aftur vikarur í kvøld. Hesa ferð á høgra bakki fyri Kenneth Jacobsen, sum er leikbannaður.

Og so er spurningurin, um aðrar broytingar verða gjørdar. Ein møguleiki er, at Fróði Benjaminsen veður flutttur upp á miðvøllin, meðan Klæmint Matras aftur fer í miðverjuna, men tað er so eitt av putlispølunum, sum B36-venjarin – Sigfríður Clementsen – skal fáa upp á pláss, áðrenn hann sendir sínar ellivu mans út á vøllin.

# HB-úrskurðurin er ávegis

**Kappingarnevndin hjá FSF hevði fund um Páll M. Joensen málið í gjár. Og heilt skjótt verður úrskurðurin í málinum liðugur**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast ætlanirnar vóru um tað, so eydnaðist ikki Kappingarnevndini at avgreiða triðja umfarið av Páll M. Joensen málinum undan ólavsøku.

Men nú verður tað ikki leingi at bíða. Formaðurin í Kappingarnevndini, Høgni í Stórustovu, sigur, at nevndin hevði fund um málið í gjár, og at arbeiðið við at skriva úrskurðin nú er farið ígongd.

Júst nær úrskurðurin verður almannakunngjørdur, er ikki greitt enn, men sum skilst, so verður hetta í fyrsta lagi í kvøld.

Í viðgerðini av málinum um Pall M. Joensen skuldi Kappingarnevndin í hesum førinum hava atlit til málini um spæliloyvini hjá Knút Vesturdal Vesturtún og Klæmint Matras hjá ávíkavist EB/Streymi og B36. Skrásetingarnar viðvíkjandi spæliloyvunum hjá hesum hava verið nakað ógreiðar, og í viðgerðini í Ítróttardómstólinum varð mett, at FSF hevði ikki lyft próvbyrðuna fyri, at hesir vóru at rokna sum lógligir. Kravt varð tí, at hesi bæði málini mest sum gjørdust partur av viðgerðini, soleiðis at líkareglan er galdandi, tá slík mál verða viðgjørd.

## Gongur strúkandi hjá Start

**Mánakvøldið var Todi síðsta hálva tíman á vøllinum, tá ið Start fór við øllum stigunum av Ullevål**

NOREG
*Jákup Mørk*

Tað hevur havt gott árin á úrslitini, at Start hevur skift venjaran út. Fyrst vann Start á heimavølli móti Rosenborg. Tað var roknað sum týdningarmikil sigur. Mánakvøldið var Start í Oslo, og aftur hesa ferð eydnaðist tað at fáa fulla úrtøku.

Start vitjaði Lyn, sum hevur heimavøll á tjóðarvøllinum Ullevål. Hetta var fyrsta ferðin, at nýggi Start venjarin, Stig Inge Bjørnebye, hevði ábyrgdina av Start liðnum, sum hann bara hevði vant eina ferð saman við undan ferðini til Oslo.

Start vann 2-1, eftir at teir høvdu verið framman fyri 1-0, tá ið tað var hálvleikt. Høgri vongverjin, Kristoffer Paulsen, skoraði eftir frísparksinnlegg.

Fýra minuttir eftir steðgin økti David Nielsen um munin til 2-0. Hann var púra leysur við málverjanum Eddie Gustafsson, ið er fyrrverandi kappingarneyti hjá Jákupi Mikkelsen í Molde, og David Nielsen var púra kaldur, tá ið hann vann tvídystin.

Í 68. minutti minkaði Lyn um munin til 2-1, og síðstu løtuna trýstu teir nógv fyri at javna, men tað eydnaðist Start at halda tørn.

Todi Jónsson varð skiftur inn fyri David Nielsen, tá ið tað restaði ein hálvur tími. Sigurin ber við sær, at Start eftir fimtan umfør er fýra stig frá bronsuplássinum og tvey stig frá næstaftasta plássinum, sum ber beinleiðis niðurflyting við sær.